## Altjóða Barnalegur CISV skipar fyri

# stuttligari og spennandi summarfrítíð !!!

Børn og ung hava aftur í summar møguleikan at søkja um luttøku á CISV legum. Legurnar, sum á hvørjum ári, verða hildnar um allan knøttin, byggja allar á sama grundsjónarmið. Børnini koma, at liva saman við børnum úr nógvum øðrum londum, skapa vinarbond og læra um fólk og mentanir í hinum londunum.

Í ár, kunnu føroysk børn og ung, luttaka á hesum legum:

- **Barnalegu í Norra, Svøríki, USA, Tjekkia og Italia**
  Legurnar eru fyri 11-ára gomlum børnum, og vara í 4 vikur. Í hvørjum bólki eru 2 gentur, 2 dreingir og ein leiðari.
- **Summarlegu í Brasilia og í Italia**
  Tey ungu skulu verða 14 – 15 ár. Hesar legurnar vara í 3 vikur. Í hvørjum bólki eru 2 gentur, 2 dreingir og ein leiðari.
- **Seminarlegu í Ungarn og í Svøríki**
  Ein luttakari 17 – 19 ár til hvørja legu. Hesar legunar vara eisini í 3 vikur.
- **Ungleiðari til barnalegu í Finnlandi og í Portugal**
  Ungleiðarar skulu verða 16 - 17 ára gomul.
- **Leiðarar til barnalegurnar og summarlegurnar**
  Vit hava í ár brúk fyri 7 leiðarum. Leiðararnir skulu verða í minsta lagi 21 ár. Hava hug og hegni at fáast við børn og ung. Og duga væl, at samstarva við onnur.

Heldur tú, at hetta er nakað fyri teg, so ring til CISV tlf. 509697 og bið um eitt umsóknarblað. Freistin at søkja er 1. feb. 2004.

# Dagrøktari

søkist til dagrøktina í Sørvági, at byrja skjótast tilber.

Dagrøktarheimið skal vera innrættað barnavinarliga, har rúm er til børnini at spæla í og hóskandi, trygt spæliøki uttanfyri.

Arbeiðstíðin, løn og frítíðarskipan verða sambært sáttmála við Starvsmannafelagið og Sørvágs Kommunu.

Skrivlig umsókn skal vera Dagrøktarskipanini í hendi innan 15.01.04.

**Dagrøktarskipanin í Sørvági**
FO-380 Sørvágur
Tlf. 213122

# Pedagogur

## til Sambýli á Líknagøtu

Innan Heimarøktina og Serforsorgina við fyribils tænastu á Sambýlinum á Líknagøtu í Runavík er eitt starv leyst til setan 1. februar 2005 ella eftir nærri avtalu.

Talan er um eitt tænastumannastarv. Løn- og setunartreytir sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Pedagogfelag, lønarstig 24-33 eftir lønartalvu pr. 01.10.04

Arbeiðstíðin er 40 tímar um vikuna, skiftandi vaktir umframt arbeiði vikuskiftir og halgidagar.

Uppgávan er at arbeiða í sambýli hjá trimum ungum monnum við autismu. Arbeiðið fevnir um at skipa gerandisdagin fyri hesar ungu menninar. Arbeiðið hevur m.a. við sær at gera kropsligt arbeiði, ganga túrar, svimja, gera fimleik o.s.fr.

Starvsøkið er allur stovnurin, og tann setti kann rokna við at fáa aðrar uppgávur aðrastaðni í skipanini, um tørvur gerst á tí.
Starvið er ætlað pedagogi, men um ongin skikkaður pedagogur søkir, verður starvið fyribils sett við fólkið við aðrari útbúgving. Setanin verður tá sambært hjálparfólkasáttmálan millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Pedagogfelag.

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Oddfríðu Højgaard, leiðara á tlf. 226121.
Umsóknarfreistin er. 21. februar 2005 og skulu umsóknirnar sendast til:

**Bústovnin á Rúnarvegi**
ATT.: Leiðarin
Rúnarvegur 6
FO - 620 Runavík

Lesið Sosialin -so eru tit við!

# Sløkkiliðsmenn

## til Fuglafjarðar sløkkilið

Fuglafjarðar kommuna søkir hervið eftir 2 leysum sløkkiliðsmonnum til Fuglafjarðar sløkkilið til setan 1. februar 2005 ella skjótast eftir hetta.

Sum treyt verður sett, at viðkomandi skulu hava heilsuváttan og stóra koyrikortið, somuleiðis sum teir antin hava ella skulu taka neyðugt grundskeið í 1. hjálp. Neyðuga víðari útbúgving sambært kunngerð um útbúgving av sløkkiliðsmonnum skipar Fuglafjarðar sløkkilið fyri.

Nærri upplýsingar um størvini eru at fáa frá brunastjóranum Gordon M. Petersen á telefon 220101.

Møguligar umsóknir, ið skulu vera skrivligar, skulu vera Fuglafjarðar kommunu, Norður í Gerði 10B, 530 Fuglafjørður í hendi í seinasta lagi 25. januar 2005 kl. 15.00.

Kommunan skilar sær rætt til at velja millum innkomnar umsóknir ella onga at taka.

*Fuglafjørður, tann 6. januar 2005*
**Fuglafjarðar kommuna**

# HARUVEITSLA Á HOTEL NORÐ

**15. januar 2005 verður skipað fyri haruveitslu.**

**Byrjað verður kl. 19.00**

**Á skránni er:**
· Matskrá við 3 rættum.
· Fyrilestur við Doretu Bloch.
· Hjørleif Kúrberg greiðir frá handfaring av skotvápnum og skilagóðum mannagongdum í samband við haruveiðu.
· Høvi verður eisini at síggja útgerð til haruveiðu frá p/f Svend Krosstein.
· Felagssangur og ymiskt undirhald
· Dansurin byrjar kl. 23.30.
(kvinnur hava ókeypis atgongd til dansin).

**Møguleiki er fyri gisting.**

**Kostnaður pr. persón kr. 300,-**

**Tekning á tlf. 451244 ella 217020 innan 14. januar 2005.**



HOTEL NORÐ
FO-750 VIÐAREIÐI · TEL (298) 451244 · FARTEL (298) 217020
FAX (298) 451245 · WWW.HOTELNORD.FO

# Rundsag til sølu

Brúkt rundsag við stórum rulliborðið, 350 mm blað 80 mm skeritjúgd, forskerarablað, góð plátusag.

TEKNISKI SKÚLIN
TÓRSHAVN

Marknagilsvegur 75 · Postsmoga 239
FO-110 Tórshavn
Tlf. 311957 · fart. 222552 · telefax 316621
tst@tst.fo · www.tst.fo



## Amerikanarar í serklassa til sølu

| | |
|---|---|
| Typa: | Dodge Ram 2500 og 3500 Turbodiesel |
| Orka: | Diesel |
| Effekt: | 280 HK |
| Árgang: | 1999 og 2000 |

Bilarnir verða seldir við MVG. Annar Pick-up ella vørubilur kann møguliga ganga inn sum partur av gjaldinum.

Bilarnir kunnu síggjast í Miðvági.

**Áhugaði kunnu ringja til Jákup S. Joensen fartlf. 212422 ella við at senda teldupost til jakup@oilwind.fo**